LM-066/2025

From: Joannes Dali <joannes.dali@gmail.com>
Sent: fríggjadagur, 30. januar 2026 20:03
To: Hallur Markná <hallurm@logting.fo>; Eyðgunn Samuelsen <eydgunns@logting.fo>; Beinir Johannesen <beinirj@logting.fo>; Magnus Rasmussen <magnusr@logting.fo>; Steffan Klein Poulsen <steffanp@logting.fo>; Bjarni Hammer <bjarnih@logting.fo>; Dennis Holm <dennish@logting.fo>; Hanna Jensen <hannaj@logting.fo>; Jóhannis Joensen <johannisj@logting.fo>; Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir <elsebethg@logting.fo>; Erhard Joensen <erhardj@logting.fo>; Jenis av Rana <jenisr@logting.fo>; Ingilín Didriksen Strøm <ingilins@logting.fo>; Erling Eidesgaard <erlinge@logting.fo>; Karlot Hergeirsson <karloth@logting.fo>
Subject: Fwd: Omanlop - stuttflutt - til byrging

Til Løgtingsins Fíggjarnevnd.

Vegna tað at fíggjarnevndin hevur freist til 18.02.2026 at svara Løgtinginum, vil eg senda fíggjarnevndini makaskriv av tí umbøn um framløgu eg havi biðið fíggjarmálaráðið um, og sum eg eisini haldi er gagnligur at kunna Løgtingsins fíggjarnevnd.

Orsøkin er, at eg eri komin fram á, at verkætlanin kann setast í verk á ein heilt annan hátt enn áður var neyðugt og ætlað, nú stórar mongdir av gróti er vorin tøkt einans 6 km. frá har grótið skal nýtast til ætlaðu byrgingina.

At hetta grótið nú er vorið tøkt, ger at alt hugskotið um ein "suðuroyartunnel" gerst lættari, skjótari og tryggari at seta í verk, skjótari at gjøgnumføra, og til ein væl lægri kostnað enn áður mett.

Eg vil tí viðleggja umbønina eg sendi til Fíggjarmálaráðið, við umbøn um framløgu fyri Løgtingsins Fíggjarnevnd.

Vinaliga

Jóannes í Dali

LM-066/2025

---------- Forwarded message ---------
From: **Joannes Dali** <joannes.dali@gmail.com>
Date: Fri, Jan 30, 2026 at 4:17 PM
Subject: Omanlop - stuttflutt - til byrging
To: <fmr@fmr.fo>, <bara@fmr.fo>
Cc: Annika Poulsen <annika@fmr.fo>, <atlie@fmr.fo>

Til Fíggjarmálaráðið.

Viðv. framløgu fyri fíggjarmálaráðið.

Tað hevur havt óhepnar avleiðingar, at eitt mál sum "suðuroyartunnilin" endaði á einum borði, sum ikki sjálvt hevði innanhýsis førleikar at meta um t.d. tær tøkniligu og samfelagsligu partarnar av verkætlanini.

Eisini er tað sera óheppið, at ein stóvnur sum Landsverk (hevði hon virkað til lítar) er blivin hildin uttanfyri, og at t.d. Strandfaraskip Landsins als ikki er tikin við í tilgongdina.

Hetta vóru tveir "BRØLARIR" av teimum HEILT stóru.

Landsverk er nýstani nú komin til orðana í nøkrum hoyringsskrivum til fíggjarnevndina – ja, tú "hoyrdi" rætt - sum de facto átti at verið viðgjørd áðrenn Løgtingið fór at hugsa um fasta sambandið í suðurøkinum.

Og eisini fíggjarmálaráðið fær nýstani nú møguleika at gera viðkomandi viðmerkingar – men eisini í hesum førinum "bert" til fíggjarnevndina.

P/F Suðuroyartunnil hevur lagt til viks alt tað sum átti at verið sjálvt støðið og tað grundleggjandi, og einans hugsavnað seg um hvar eitt hol kundi borast niður í jørðina.

Tann kognitiva (fatarnarligu) hugsjónarliga tilgongdin hevur – snøkt sagt - verið "ikki eksisterandi".

Men tað er ikki tað sum mín umbøn um eina framløgu skal snúgva seg um, og hetta er bara ein staðfesting av fakta, og hví tað er gingið so galið.

Ein óhugnaligur og ófrættakendur ódugnaskapur at fyriskipa og at samskipa.

Mín framløga skal greiða frá á hvønn hátt tað skjótast og bíligast kann fáast fast samband – og fyri fyrst til Skúgvoy.

At øll farleiðin skal vera so trygg sum gjørligt.

At øll farleiðin skal vera so bílig sum gjørligt at reka.

Og sum – eisini í byggitíðini – vil føra til flest møguligar ágóðar – fyri ein lægri kostnað.

Óv gott at tað kann vera so, kann hugsast, men nei, á ongan hátt.

Orsøkin til ruðuleikan er heilt einfalt, at eingin er blivin biðin um at fara at hugsa sær HVUSSU eitt slíkt UMSKIFTI best kann gerast, tí Løgtingið hevur einans ynskt at fáa at vita, hvar eitt ávíst hol kundi borast.

Og so blivu fjarðarnar í teimum mekanisku dukkunum trektar upp og sleptar út á gólv at mala.

Tað átti sjálvsagt at ligið eitt drúgt "umhugsunararbeiði" – eitt álit ella "Betænkning"- ÁÐRENN "tunnilsmálið" bleiv reist í Løgtinginum.

Hetta er ein "samferðslu- og samfelagsstrukturbroyting" við stórum avleiðingum alt eftir hvussu hetta verður gjørt og sum kostar kanska 5 mia. kr., og sum skal gjaldast "í einum".

Men hóast hetta var t.d. Landsverk ikki játtað pening til slíka kanning.

Man hevur í politisku viðgerðini púra útihýst leiklutin hjá Landsverk og t.d. hjá Strandfaraskipum Landsins og verandi tænastur teirra, sum skulu niðurleggjast, og ikki hugsað um hvørji íkast tey kundi veitt í sambandi við eina umlegging til føstum sambandi í øllum suðurøkinum.

Tann primeru parturin í verkætlanini.

Hóast at Landsverk fyrr hevur víst á eina byrging millum Skarvanes og Skúvoy, so broyttu tey støðu við tí páhaldinum, at ov lítið var til av "suðuroyartunnilsgróti" (3 mill. m3) til eina byrging, og at tað var ov dýrt at sprongja grót úr einum grótbroti til eina byrging (so sum man gjørdi til Skansabrúnna – 3.6 mill. m3), sjálvt um nógv grót eisini skuldi sprongjast bæði í Sandarlíð og í klivunum við Skarvanesi.

Landsverk vísti í tí sambandið á, at tað kravdust 8-10 mill. m3 av gróti til eina byrging, men hava nú ásannað, at tað einans skulu nýtast 6 mill. m3 (sjálvt um profilurin er júst tann sami), og at meira enn 1 mill. m3 liggur á goymslum í nærumráðnum.

Fíggjarnevndin hevur tíbetur nú - við stórum nærlagni – sett fleiri sera viðkomandi og atfiningarsamar spurningar til Løgmann (men aðrir spurningar kundu eisini verið settir).

Sum eg lesi tað fíggjarnevndin skrivar, so biða teir í veruleikanum løgmann taka uppskotið aftur og viðgera tað betri áðrenn eitt so stórst mál verður lagt aftur á Tingborð, tí Løgmaður kann ikki svara allar spurningarnar á nógv dygdarligan hátt, áðrenn freistina, sum er mánadagin.

Hetta er fakta fram til í dag.

Ein nýggjur møguleiki er komin í ljósmála.

Omanlopið sum var í Skúvoy í fjør, ger tað møguligt at gagnnýta hetta gróttilfangið uppá meira enn 2 mill. m3, sum er betri egnað enn tunnilsgrót, til gerð av byrging.

Harumfrant stendur tað til at leypa aðrastaðni í Skúgvi, so hendan nøgdin verður møguliga skjótt økt til tað trýdupulta (sjá myndir, sum vísa rivur í lendinum).

Um hetta grótið verður nýtt, verður talan um stuttflutt og burðardygd tilfar, sum onki hevur kostað at framleiða, tí tað er einans talan um at flyta hetta grótið, sum nú liggur sum møl í sjóvarmálanum, úr einum staði í annað.

Tað gert ikki bíligari og burðardyggari.

Alt flutningsarbeiðið kann gerast við skipum og einans frá sjóvnum, og krevur onga koyring ella inntriv á landi.

Eini 5-6 grótbátar við ymiskum amboðum (kranum, grabbum og bógvrampum) kunnu í døgndrift uppá eitt langt summar fáa til vega fast samband og ein arbeiðsveg millum báðar oyggjarnar, til ein kostnað sum er lægri enn hvat Løgtingið longur nú hevur oyramerkt í 2025 og 2026 til fasta sambandið pr. ár (100 mill./ár)

Ein byrging hevur so ómetaliga nógvar fyrimunir við sær framum ein tunnil, og vil gera alt umhvørvið í Skúvoyarfirði til vágir og nógv betri at vera og trívast í.

Tað verður tá talan um tvær vágir við – nærum - tutlandi aldum og sleppas kann undan havaldum niðan í bakkan.

Møguligt verður at hava aling sunnanfyri byrgingina, og hetta vil skapa størv í nærsamfelagnum, heldur enn at fólk vera noydd at koyra gjøgnum undirsjóvartunnlar at finna sær arbeiði.

Fakta er, at tá vantandi omanlopini eru lopin (og sum kunnu fáast at leypa við sprongievni), so kann ein heilt liðug byrging gerast fyri ein brøkpart av tí ein tunnil hevði kostað, og vera (næstan heilt) liðug uppá 2-3 ár.

Við byrgingin kann gerast deils eitt kaiøki og fergulega við Skarvanesi (sum verður neyðugt í sambandi við byggingina av sjálvum tunnlinum víðari suður), og so kann skipast fyri fergusamband til Hvalbiar við 4 dupulttúrum uppá 40 minnuttir um dagin, til avlastning av Smyril, og sum tá tunnilin er komin, skal vera trygd fyri einum sjóvsambandi, um okkurt skuldi hent í tunnlinum, so hann bleiv stongdur í nakrar dagar.

Í Skúvoy, í Skarvagjógv og út fyri Skarvatanga – sum er kyrrasta staðið í Skúgvi - kann gerast eitt byggiplássøki til tunnilsboringina longur suður, til tess at sjálvt lendið í Skúgvi verður órógvað sum minst.

Hesi bæði økini kunnu so seinni vera nýtt í sambandi við aling.

Við hesum leisti hevði man havt eitt sera trygt ástøði at bora víðari suðureftir, har tunnilin hvørki í longd ella vegna jarðfrøðina hevði givið høvuðbrýggj, hvørki viðvíkjandi kostnað ella figging, ella vegna rakstrarútreiðslur og trygd.

LM-066/2025


Men tað er eisini sera umráðandi, at vegakervið til eysturbygdirnar á Sandoynni verður samskipað ÁÐRENN høvuðsverkætlanin byrjar, og at m.a. landsvegurin úr Sandoyartunnilin verður lagdur framvið bøgarðarnar í Trøðum (so alt økið vestanfyri í framtíðini ikki verður "niðurbundið" av einum høvuðsferðsluvegi har hámarksferðin kann setast til 100 km./t.

Við hesum leisti hevði høvuðsverkætlanin minkað niður í helvt, og útreiðslurnar til núverandi sjó- og tyrlusambandið høvdu minkað munandi (eini 20-30 mill./ár), og Suðuroyggin hevði fingið minst 4 dupulttúrar um dagin, ÁÐRENN høvuðsverkætlanin var sett í verk.


Umframt at samlaða verkætlanin hevði verið liðug uppá uml. hálva tíð í mun til verkætlanina hjá Tunnilsfelagnum.

Vinarliga


Jóannes í Dali


3/2022
Tunnil
Skúvoyar
Rundkoyring til
Skúvoyar bygd
Tunnil til Stóru Dímun
Hóðast tað er stormur av
ÚS við 25-30 m/s eru
ongar stórar aldur við
byrgingina
Byrgingin er 3.400 m.
Dýpið á miðuni
er bert 11 m.
Sandur
12
40
37
37
37
Skarvanes
Image © 2023 Maxar Technologies
Image © 2023 CNES / Airbus
Image Landsat / Copernicus
1498 m
1985
Google Earth
Dato for billede: 3/19/2022 61°47'24.50"N 6°47'23.30"V niveau -12 m ojehøjde 4.83 km

LM-066/2025


Forklaring
Her eru aldurnar 250 m. langar.
Skúvoyarfjørður
Skarvanes
Tað fara uml. 1½
Skansabrúgv í
Skúvoyarbyrgingina
Nýtt Aliøki
Nýtt Aliøki
Dýpið er bert
11 m. á miðuna.
Hóast tað er stormur av ÚS
við 25-30 m/s, eru ongar
stórar aldur við byrgingina
Tað er harði streymurin
sum ger uppgangin í
Skúgvi og á Skarvanesi.
Skúvoyar
N

LM-066/2025


LM-066/2025

LM-066/2025


LM-066/2025